# Eitt maskinmeistarave



**Hóast fløkjasligi húsin ger, at man næstan ikki hevur hug at fara undir trífaldu fløguna, »Úr Maskinrúminum« hjá Kaj Klein, so er hon verd avbjóðingina. Kaj hevur gjørt bestu føroysku útgávuna higartil í ár.**

UMMÆLI
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

»Úr Maskinrúminum« er úrslitið av samstarvi millum tveir útisetar, vestmenningin Kaj Klein og havnarmannin Tórodd Poulsen. Saman við einum flokki av donskum topptónleikarum hava teir skapt eitt ótrúliga flott verk, eitt maskinmeistaraverk. Eina trífalda fløgu, tretivu skeringar ella tilsamans 125 minuttir og 45 sekund av tónleiki upplestri og ljóðmyndum. Hetta er einki minni enn eitt stórverk. »Úr Maskinrúminun« hevur satt at siga ikki serliga nógvar veikar løtur.

Á fløguni er fimm sløg av skeringum. Har eru teir 14 sangirnir hjá Kaj við orðum hjá sær sjálvum ella Tóroddi, tvey lániløg, tvey instrumental løg, fýra skerðingar við upplestri av Tóroddi við tónleiki undir og átta skerðingar við upplestri av Tóroddi við ljóðmyndum undir.

## Nógv fangandi løg

Sangirnir hjá Kaj eru sum heild framúrskarandi góðir. Har eru t.d. fantastisk og syngi-við-vinarlig løg, sum »Pallasa Pengar« við festliga kórinum, ið tungmálmsbólkurin SIC stendur fyri. Tað er lætt at ímynda sær seigliga niðurlagið: »Vit drekka okkum fullar fyri Palla'sa pengar«, sum fastan tátt í komandi føroyskum drykkigildum, ein lagna, ið lagið »Charlie« eisini lætt kann fáa. Teksturin, ið vinarliga lænir frá Lokum klassikaranum av saman navni, vísir, at Kaj hóast síni nógvu ár uttanlands kennir til heimliga tónleikapallin og samfelagið. Eisini løgini »Sawyer« og »Spurningur til Fanan« eru sera fangandi. Men hetta er ikki fyri at taka nakað frá

*Sangirnir hjá Kaj Klein eru sum heild framúrskarandi góðir, heldur ummælarin hjá Sosialinum*

Sosialurin